# Jólini
2017

## Skrá
### fyri jóla- og nýggjárshaldið á Tvøroyri

TÓRSDAGIN
**16.**
NOVEMBER

**19:00** **NADDODDANEYSTIÐ**

“Haruveiða í Føroyum”, fyrilestur um haruveiðu, harustovnar, skráseting v.m. Eyðfinn Magnussen, lektari, greiðir frá. Jens Rói Sørensen kemur at hugleiða um klappjaktin í Trongisvági, ið er Føroya elsta av sínum slagi. Smakkroyndir verða at fáa, myndir verða vístar og Tróndur Enni syngur nøkur løg. Ókeypis atgongd.

FRÍGGJADAGIN
**17.**
NOVEMBER

**14:00** **PAKKHÚS 5**

Málningar eftir navnframa málaranum Hans Skálagarð verða sýndir fram. Meginparturin av málningunum sýnir sluppir úr oynni. Kostnaður 50,-

ÓNSDAGIN
**22.**
NOVEMBER

**19:00** **SEGLLOFTIÐ**

“Nýggjur borgari á Tvøroyri”. Tiltak, ætlað tilflytarum til kommununa. Marina Popovic, úr Serbia, og Nancy Steinkross, úr Ghana, hugleiða um tað at vera tilflytari á Tvøroyri, vísa myndir og bjóða smakkroynd av mati, ið sermerkir teirra heimstað.Nýggjur tilflytarafaldari verður avdúkaður og tónleikur við Eyðun Nolsøe verður á skránni. Kaffi og køkur verða at fáa.

LEYGARDAGIN
**25.**
NOVEMBER

**16:30** **MIÐBÝURIN**

Jólatræið í miðbýnum verður tendrað. Jólamenninir koma og nissubørnini hjálpa til við at deila pakkar út. Frelsunarherurin skipar fyri sangi og upplestri og, um viðrar, verða “kinesiskar lampur” sleptar upp í loft. Tvøroyrar Hornorkestur  og Sløkkiliðið luttaka.

MÁNADAGIN
**27.**
NOVEMBER

**19:00** **SKÚLAHØLLIN Í TRONGISVÁGI**

TB-Flogbóltur skipar fyri sera góðum jólabingo.

TVØROYRAR KOMMUNA

# Skrá

## fyri jóla- og nýggjárshaldið á Tvøroyri

MÁNADAGIN 27. NOVEMBER

18:00

Jólatræið í **Froðba** verður tendrað. Jógvan Højgaard, trúboðari, skipar fyri.

TÝSDAGIN 28. NOVEMBER

18:00

Jólatræið í **Øravík** verður tendrað. Jógvan Højgaard, trúboðari, skipar fyri.

ÓNSDAGIN 29. NOVEMBER

18:00

Jólatræið í **Trongisvági** verður tendrað. Jógvan Højgaard, trúboðari, skipar fyri.

LEYGARDAGIN 2. DESEMBER

14:00 - 19:00 TVØROYRAR KLUBBI

Árligi sera væl umtókti jólamarknaðurin, við alskyns heimagjørdum til jóla. Ókeypis tilmelding á tlf. 284480 ella 214614 innan

2.-3. DESEMBER

15:00 - 18:00 NADDODDANEYSTIÐ

Ítrivsstovan hjá Estrid og Sáru. Fyri øll, ið hava hug til at vera eitt sindur kreativ upp til jóla.

LEYGARDAGIN 9. DESEMBER

18:00 VIÐARLUNDIN

Hugni í viðarlundini í Trongisvági. Bollar og kakao verða at fáa og nissurnar koma at vitja. Felagssangur og søla av heimagjørdum jóladekoratiónum v.m., er eisini á skránni.

SUNNUDAGIN 10. DESEMBER

16:00 TVØROYRAR KIRKJA

Jólini verða sungin inn í Tvøroyrar Kirkju

TÓRSDAGIN 14. DESEMBER

TVØROYRAR SKÚLI

Jólahugni í Tvøroyrar Skúla. Tvøroyrar Skúli er karmur um árliga jólahugnan hjá næmingunum. Filmsýning, kafé og annað er á skránni. Tíðir verða kunngjørdar á heimasíðuni hjá Tvøroyrar Skúla. WWW.TVOROYRARSKULI.FO

TÝSDAGIN 19. DESEMBER

18:30 SALT Á DRELNESI

Árliga jólahaldið hjá Tvøroyrar Skúla, verður í SALT.

TÝSDAGIN 26. DESEMBER

14:00 - 17:00 SEGLLOFTIÐ

"Áðrenn Jobmatch" á Segloftinum. Tiltak fyri arbeiðssøkjandi og øðrum áhugaðum í at arbeiða á Tvøroyri. Til ber at hitta umboð fyri vinnulív, kommunu og onnur. Røða v. Kristin Michelsen, borgarstjóra, Henrik Weihe Joensen, kommunustjóra og tónleikur við Jens Marna Hansen er á skránni.

Gamlaárskvøld 31. desember

SANDURIN, DRELNES, OYRNAFJALL OG SALT

14:30 Árliga "pílagrímsferðin" niðan á Oyrnafjall byrjar við verðstaðið hjá Simo, við Gamlansá. Øll eru hjartaliga vælkomin.

23:45 Kyndlagongan byrjar í Trongisvági, har gamla stoypivirkið var. Møtið í seinasta lagi kl. 23:30

24:00 Stórt nýggjársbál á sandinum og risa fýrverksshow frá Gamlaársnevndini verður skotið av frá Drelnesi. Aftaná verður ábit og sjampanja í SALT.